# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Búskaparskipan Landsins – eitt eymt mál

Ikki vardi tað okkum, at oddagrein okkara 7. februar skuldi elva til so ógvusligar reaktiónir. Aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum (FMR) skrivar í viðmerking til oddagrein okkara 7. februar, at Sosialurin niðurger Búskaparskipan Landsins. Tað er ikki ætlanin at niðurgera nakra skipan ella nakran einstakling, og harmar tað okkum, um nakar kennir tað so. Vit seta spurnartekin við ting og royna at birta uppundir kjak. Alt, sum gjørt verður fyri skattgjaldarans pening, má tola spurningar.

Hergeir Nielsen setur í dag fram fyrispurning um skipanina, og endurtekur nøkur av punktunum hjá Aðalstjóranum í Fíggjarmálaráðnum. At spurningar frá okkum verða tiknar sum staðfestingar í FMR og av Hergeiri Nielsen, er sjálvsagt harmiligt, men vit meta framvegis, at Búskaparskipan Landsins reisur fleiri spurningar, sum enn ikki eru svaraðir.

Tað, sum vit kundu hugsað okkum at vitað, er, hvussu nógv Búskaparskipan Landsins hevur kostað samanlagt, og hvussu nógv man metti av fyrstan tíð, hon kom at kosta. Hetta er ein spurningur, sum framvegis stendur ósvaraður, og sum burdi havt stóran almennan áhuga. Menningarkostnaðurin er eisini relevantur, um man t.d. ætlar at selja øðrum hesa skipanina, tá nú áhugin sambært FMR er stórur uttanlands fyri hesi skipan.

Aðalstjórin í FMR sigur, at tað verður arbeitt hart fyri at sleppa uttanum hesa skipan, og at hetta kemur at ganga útyvir gjøgnumskygni í samfelagnum. Hetta kundi sæð út sum ein ákæra móti almennum stovnsleiðarum. Vil man so frá FMR siga, at hesir ikki hava grein í sínum máli? Suboptimera hesir? Hesir pástandir fáa illa staðið einsamallir.

Hvørjir upplýsingar eru tað, at FMR skal hava, fyri at hava nóg góða vitan, um tað sum fyriferst í tí almenna? Kunnu aðrar skipanir ikki geva hesar upplýsingar? Vit hava ikki róð uppundir, at stovnar skulu dylja nakað. Tað burdi eftir okkara tykki snúð seg um einfalda útdelegering og eggjan til nýhugsan.

So vítt vit duga at síggja, so er hetta ikki eitt kjak um upplýsingar ella at dylja nakað. Hetta tykist vera eitt kjak um skipanir, har landið hevur ment eina, sum allir stovnar ikki halda vera besta amboðið til alt. Tað týdningarmesta nú er at hoyra allar partar, so øll fáa argumenterað fyri sínum, og at øll relevant tøl koma á borðið.

Kanska fara komandi dagarnir at vísa, at vit fara skeivir, men vit vildu hildið, at ein pennur kann vera líka góður sum ein annar, bara teir skriva tað, sum kravt verður, at teir skulu skriva á tí máli og til ta tíð, sum kravt verður.

**Sosialurin**

## Viðmerking til Nicolinu Jensen Beder og tær foldaðu hendurnar

GERHARD LOGNBERG
Løgtingsmaður



Nicolina er úr góðum bergi sprotin. Eisini veit hon so væl úr teimum Heilagu skriftum. Eingin skal verða í iva um, at eg persónliga haldi, at Nicolina hevur ótrúligar holdningar til Guds orð, men Gud havi lov, at vit hava rætt at siga tað vit vilja í okkara landi.

Einaferð í einum skrivi hevði tú at fólki, sum bukaðu onnur í høvdið við skriftstøðum úr Bíbliuni.

Nú haldi eg, at flest fólk sum tú ikki er samd við, ganga við nógvum pentum í høvdinum, sum tú bukar onnur við skriftstøðum.

Skriftstøðini úr bíbliuni og artiklarnir eru so langir, at man næstan noyðist út í tún at lesa teir.

Men eg rokni bara við, at tú meinar tað tú sigur, og tað ger meg enn meira ørkymlaðan.

Men tá tú fer at gremja teg um, at løgtingmenn eru til bønarmøti, so standi eg púrasta á berum - og eri málleysur!

Er tú so uppgirað, av tí at grein 266b varð samtykt, og sær bara fyri tær, at best var at øll vóru kynsvillingar!

Aftur til bønarmøtini, sum tú so staðiliga fráræður.

Tú sigur, at tú hevur hoyrt, at tingmenn hava bønarmøti áðrenn tingfundin, og tað fráræður tú staðiliga.

Nicolina, og hvat so? Gævi at so var. Eg veit einki um hesi bønarmøti. Neyvan eru tey, tí slíkt verður vælsaktans ikki hildið loyniligt.

Men Nicolina, tað eru andaktir umleið einaferð um mánaðin niðri á Gamla Apoteki, hevði tað kanska verið betur at slíkt ikki var loyvt, eg spyrji bara.

Um onkur hevur bønarmøti í løgtinginum, so vildi eg gjarna verið við, tí eg havi brúk fyri bøn og forbøn.

Men Nicolina, umskylda at eg sigi tað. Er tú ikki á markinum, at fara ov langt, hvat øðrum sum tú metir ikki eru líka trúgvandi sum tú?

Til seinast, er tað nakað vit í okkara landi hava brúk fyri, so er tað fólk, sum folda hendur og rópa til hin livandi Gud, bæði á bønarmøti og í loynikamarinum.

Eg føli meg noyddan at svara tær aftur, tí tann, ið tegur, hann samtykkir verður sagt.

## Búnaðarútbúgvingin

PETUR SKEEL SKARÐSÁ
Funningur 16. februar 2007

Í degi og viku tann 15. februar hoyrdu og sóu vit, at nú skal búnaðarútbúgving setast á stovn á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Ein 3 ára útbúgving fyri at lúka treytirnar at kunna festa ein garð og gerast bóndi.

Alt gott um útbúgving. Og lærdómur er lættur at bera, men og aftur men; fyri skjótt mongum árum síðan var alt samfelagið á gosi av Fólkaflokkinum, ið nýtti allar hugsandi snildir at fáa sett á stovn eina royndarstøð, ið skuldi verða tað einasta frelsandi fyri føroyska landbúnaðin.

Á hesi royndarstøð skuldu teir ungdómar, ið høvdu áhuga fyri jarðaryrkinum fáa bæði teoretiska og praktiska útbúgving innan jarðarbrúk.

Fólkaflokkinum so líkt trýsti hann bæði flokkar og einstaklingar so hart, at teir at enda hoknaðu og tóku undir.

Fólkafokkurin hevði lagt ætlanina. Tað ráddi um at taka tann væl rikna garðin frá húsinum á Heyggi í Kollafirði, tí tey vóru ikki fólkafloksfólk.

Stórt varð ætlað, og tá støðin stóð liðug, sigst hon at hava kostað eitt stað millum 65-70 mill. kr. So nú skuldu allar fyritreytir fyri munagóðum úrslitum verið til staðar, at skúla landsins ungdóm innan jarðaryrkið, men hvar er úrslitið?

Ein tóm royndarstøð við at kalla ongum virksemi, uttan 3. hvørt ár, tá Sundalagsstevnan er í Kollafirði. Tá og bert tá er nakað av virksemi á hesi góðu og dýru royndarstøð. Til hetta høvið koma foreldur úr høvuðsstaðnum við børnum sínum á vitjan at síggja alskins djór, ið eru flutt frá privatum á royndarstøðina hesar dagarnar. Royndarstøðin sjálv hevur at kalla eingi djór. Soleiðis er skilið.

Hvat teir ungdómar, ið hava verið á hesi royndarstøð, hava fingið burtur úr av teori og praksis, man vera so sum so. Men eitt vita vit, og tað er, at støðin kostar landskassanum nógvan pening á hvørjum ári. Nú sær út sum hetta sirkussið er við at verða fullkomið.

Búnaðarútbúgving skal nú setast á stovn sum partur av Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Tað hevur annars ljóðað, at ovlítið pláss og ov lítil játtan hevur verið høvuðseyðkennið fyri nevnda skúla. Tí tykist tað sera løgið, at tað nú brádliga eru bæði hølir og peningur til eitt víðkað virksemi har, ið einki beinleiðis hevur við fiskivinnuna sum so at gera.

Tí hevur tað almennan áhuga at fáa at vita, hvør skal hava frálæruna um hendi av hesum næmingum? Og hvussu nógv hetta er mett at kosta hvørt skúlaár?

Tað liggur nær at hugsa sær, at í framtíðini kemur eingin næmingur at vera á Royndarstøðini, tá virksemi í Vestmanna kemur í gongd. Ein kann so spyrja landsstýrismannin í búnaðarmálum Bjarna Djurholm, um ætlanin eru at leggja Royndarstøðina heilt niður?

Hvar endar føroyski landbúnaðurin?

Tað er so eygsýnt, at tað bara hevur gingið niður á bakka innan hesa vinnu, síðan Fólkaflokkurin fekk makt sum akt.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán. kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.